Eitt hjarta er, ið hin sonin elskar D-dur

D A
1. Eitt hjarta er, ið hin sonin elskar,
A D
Sum søkkur niður í synd og skarn,
D7 G D
:/: Úr faðirhúsinum sær eitt eyga
D A D
Við umsorgan á hitt vilsta barn. :/:

2. Eitt oyra er, ið seg boyggir niður,
til tey, sum rópa um hjálp í neyð,
:/: Ein tunga er, sum í náði talar
við tey, ið falla, og reisir tey. :/:

3. Ein kelda er fyri tann, ið tystir,
Eitt lívsins breyð til tey svongu er,
:/: Ein góður frístaður er og tryggur,
Har deyði, dómur ei skaða ger. :/:

4. Ja, Kom til Jesus, og tú skalt finna
Alt, ið tær tørvar til sæluna!
:/: Tí Jesus, Jesus og hann aleina
Nóg mikið er alla ævina. :/:

Ums. úr norskum